Álit

í

løgtingsmáli nr. 11/2025: Uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin)

Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum, hevur lagt málið fram tann 23. september 2025, og eftir 1. viðgerð tann 30. september 2025 er tað beint Ættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 7. og 28. oktober og 3. og 18. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MEGD, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Súsannu Bertholdsen, saman við Sjúkrahúsverki Føroya, og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna Kárason Petersen, saman við Familjufyrisitingini.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Steffan Klein Poulsen og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra og nútímansgera galdandi lóg um sterilisatión og kastratión, og samstundis verður lógin umsett til føroyskt.

Lógaruppskotið skal tryggja fólki lættari atgongd til sterilisatión, og uppskotið inniheldur onga heimild til at fremja inntriv við tvingsli.

Stóra avbjóðingin við sterilisatión er, at tá inntrivið er gjørt, er mest sum eingin vegur aftur. Hetta, saman við einum aldursmarki sum er einans 25 ár, kann slóða fyri, at mong sum velja at lata seg sterilisera, fara at angra hesa avgerðina seinni í lívinum.

Tað er nógv, sum kann henda frá tí, at ein er 25 ár, og til natúrliga tíðin at gerast foreldur er farin. Foreldur kunnu missa børn, og fólk kunnu eisini finna nýggjan maka, ið ynskir sær børn. Tá kann tað vera óheppið, um ein avgerð, tikin fyrr í lívinum, ikki kann takast aftur.

Hetta setir stór krøv til læknan, ið skal fremja viðgerðina, tí hann má vera fullvísur í, at tann, ið fær inntrivið framt, hevur skilt til fulnar, at her vendist ikki aftur.

Ein onnur avbjóðing er viðvíkjandi teimum sum bera brek. Hvussu kunnu vit tryggja, at fólk við breki, ið verða steriliserað, verða nóg væl kunnaði í sambandi við inntrivið? Sonevnda snyrilsmálið í Grønlandi hevur fingið nógvar atfinningar, tí kvinnur við breki, uttan teirra samtykki og møguliga eisini uttan at tær vistu av tí sjálvar, fingu snyril ísettan, tí myndugleikarnir ynsktu ikki, at tær fingu børn. Hava vit nakra trygd fyri, at tað sama ikki hendir við hesum?

Sambært galdandi lóg skal ein, ið letur seg sterilisera, hava váttan frá hjúnafelaganum, áðrenn ein sterilisatión verður framd. Hetta er ikki við í hesum uppskotinum. Meirilutin heldur, at tað í øllum førum eigur at vera so, at hjúnafelagin verður kunnaður.

Viðvíkjandi kastratión er meirilutin samdur við minnilutan í, at tað er eitt ógvusligt inntriv, sum bara eigur at verða framt undir serligum umstøðum, og tá aðrir møguleikar ikki eru nøktandi.

Samanumtikið heldur meirilutin, at tað er rætt at dagføra lógir, og at fáa tær skrivaðar á føroyskum máli. Meirilutin heldur tó, at aldursmarkið er sett ov lágt, og at rættast hevði verið at hildið fast við kravið um, at hjúnafelagin skal vera við í avgerðini – í minsta lagi við kunning.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hervør Pálsdóttir, Ingilín Didriksen Strøm og Kristianna Winther Poulsen) heldur, at galdandi lóggáva á økinum í nógvar mátar er ótíðarhóskandi, og at tryggjast skal fólki lættari atgongd til sterilisatión, enn tey hava í dag.

Minnilutin tekur fult undir við, at vaksin fólk sjálvi skulu hava rættin til at taka avgerð um møguliga sterilisatión.

Tað er trupult at áseta eitt aldursmark fyri, nær fólk kunnu verða steriliserað uttan loyvi. Lógarbundni myndugleikaaldurin er 18 ár, og 18 ára gomul eru vaksin fólk, sum kunnu taka avgerðir um sítt egna lív. Hinvegin er sterilisatión eitt varandi inntriv, og ein ávísur vandi er fyri, at fólk, sum velja at verða steriliserað sum heilt ung, kunnu angra inntrivið seinni í lívinum.

Minnilutin tekur undir við, at 25 ár er eitt hóskandi aldursmark, og at fólk, sum hava fylt 25 ár, og sum eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, hava rætt til at verða steriliserað. Kravd umhugsanartíð á 6 mánaðir er fyri fólk millum 25 til 30 ár, fyri at tryggja, at hesi fáa møguleika til gjølla at umhugsa avleiðingarnar av sterilisatión.

Fyri fólk undir 25 ár krevst loyvi til sterilisatión, og fyri fólk, sum ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, um tey eru ómyndig ella undir verjumáli, krevst serstakt loyvi og samráð, umframt at tey fáa tilboð um óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu.

Sambært galdandi lóg skal ein váttan innheintast frá hjúnafelaganum, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd. Tað kann vera við til at tryggja sjónarmiðini hjá hjúnafelaganum ella samlivanum, um viðkomandi hevur rætt til at verða hoyrd ella hoyrdur undan eini møguligari sterilisatión. Hinvegin er hetta í andsøgn við rættin hjá fólki til sjálvi at taka avgerðina, og tí tekur minnilutin undir við, at hendan áseting ikki verður galdandi frameftir.

Kastratión er eitt ógvusligt inntriv, sum bara eigur at verða framt undir serligum umstøðum, og tá aðrir møguleikar ikki eru nøktandi. Minnilutin tekur undir við, at aldursmarkið fyri kastratión verður broytt frá at vera 21 ár til at vera 25 ár, og at verandi heimild til at kunna geva loyvi til kastratión av persónum undir 18 ár verður strikað.

Í § 6 í lógaruppskotinum er ein tilvísing til eina heimild hjá samráðnum, samstundis sum víst verður til § 11. Samráðið er regulerað í § 12, og til tess at rætta tilvísingina setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 6 verður “§ 11” broytt til: “§ 12”.

Viðmerkingar:
Talan er um at rætta eina tilvísing.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 25. november 2025

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen	Ingilín D. Strøm
Kristianna W. Poulsen	Henrik Old	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur